**Almannastovan**
Jónas Broncksgøta 27 – Postrúm 3096
Tlf. 315480 – Telefax 318850
FO-110 Tórshavn

# Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki. Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við Almannastovuna, við regluligum fundum í mun til arbeiðið.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
- Fylgjarauppgávur
- Stimbran
- Familjuráðgeving
- Umlætting

**Størvini eru hesi:**

### Í Eysturoy

1) – at stuðla og hjálpa einum 6 ára gomlum drongi í samskiftinum við onnur børn, stimbra honum við venjingum og spæli, einsamøllum og saman við øðrum. Arbeiði hjá stuðlinum verður í Dagstovninum í Fuglafirði og í heiminum.
Tímatalið er 40 tímar um vikuna fyribils til 15.07.03
Ynskiligt er at tann í settur verður hevur koyrikort.

2) – at stuðla einum eitt ára gomlum barni við Down syndrom.
At stimbra honum við spæli og venjingum og á tann hátt vera við til at menna hann.
Arbeiði hjá stuðlinum verður í Dagstovninum í Gøtu.
Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna við møguleika til at tímatalið verður sett uppí 30 tímar um vikuna.

3) – at stuðla og hjálpa einum 7 ára gomlum drongi á allan hátt. Stimbra honum við venjingum og spæli, einsamøllum og saman við øðrum. Arbeiðið verður gjørt við tilknýti til Tilhaldi í Rók í Saltnesi.
Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.
Játtanin er fyribils 30.06.03
Ynskiligt er at tann, í settur verður hevur koyrikort

4) – at stuðla og hjálpa eini 17 ára gamlari rørslutarnaðari gentu. Arbeiði hjá stuðlinum er at fara við henni til ymisk tiltøk og annars vera við til at geva henni ein innihaldsríkan gerandisdag. Arbeiðstíðin er aftaná skúlatíð hjá gentuni og er 25 tímar um vikuna. Arbeiði verður gjørt við tilknýti til Tilhaldi í Rók í Saltnesi.
Ynskiligt er at tann í settur verður hevur koyrikort.

5) – at stuðla og menna einari 16 ára gamlari gentu. Arbeiðstíðin er aftaná skúlatíð hjá gentuni og er tímatalið 20 tímar um vikuna.
Játtanin er fyribils til 30.06.03

6) – at fara við eini kvinnu til ymisk frítíðartiltøk, og hjálpa henni við ymiskum uppgávum í gerandisdegnum. Tímatalið er 10 tímar um vikuna.
Játtanin er fyribils til 31.12.02

### Í Norðoyggjum

7) – at stuðla einum manni í gerandisligum uppgávum og hjálpa honum at skipa dagin. Tímatalið er 10 tímar um vikuna, við møguleika fyri at hækka tímatali.
Játtanin er fyribils til 01.12.02

### Í Tórshavn

8) – at stuðla einum 17 ára gomlum dreingi. Arbeiði hjá stuðlinum er at fara við honum til fysioterapi, ríðing og onnur tiltøk, og annars at verða við til at geva honum ein innihaldsríkan gerandisdag.
Tímatali er 30 tímar um vikuna.
Játtanin er fyribils til 31.12.02

9) – at hjálpa einum ungum manni við at skipa dagin og stuðla honum í gerandisligum uppgávum. Tímatalið er 10 tímar um vikuna, við møguleika fyri at hækka tímatalið. Játtanin er fyribils til 31.12.02.

10) – at stuðla og hjálpa eini ungari rørslutarnaðari gentu og fara við henni til ymisk tiltøk aftaná skúlatíð.
Tímatalið er 30 tímar um vikuna.
Játtanin er fyribils til 31.12.02

11) – at stuðla og menna eini 8 ára gamlari gentu við spæli og venjingum og fara við henni til ymisk tiltøk
Arbeiðstíðin er aftaná skúlatíð hjá gentuni. Tímatalið er 20 tímar um vikuna.
Játtanin er fyribils til 31.08.03

### Í Norðurstreymoy

12) – at stuðla og menna tveimum 9-10 ára gomlum børnum, eins og veita familjuni ráð- og vegleiðing í persónligum/gerandisligum viðurskiftum. Tímatalið er í mesta lagi 40 tímar um vikuna.
Játtanin er fyribils galdandi í eitt hálvt ár.

### Allar Føroyar

13) – Søkt verður eftir pleygufamilju til 13 ára gamlan drong. Arbeiðið fevnir um at virka fyri eini tryggari og mennandi tilveru. Játtanin er fyribils galdandi í eitt ár.

14) – Søkt verður eftir eini vikuskiftisfamilju til tvey systkin ávíkavist 2 og 5 ára gomul. Játtanin er fyribils galdandi í eitt ár.

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Sigrun Bærentsen, Ragnhild Dahl og Petur Joensen á tlf. 315480 í tíðini kl. 09.00-13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skula verða

**Almannastovuni,**
J. Broncksgøta 27,
Postboks 3096,
110 Tórshavn,

í hendi í seinasta lagi 02.07.02

**Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávu nummar.**

# Hósvíkar Skúli

Søkt verður eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv at lesa uml. 23 tímar um vikuna skúlaárið 2002/2003.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skúlaleiðaran tlf. 422259 ella 422526.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi hin 26. juni 2002.

**Skúlastýrið fyri Hósvíkar Skúla**
v/ Adolf Johannessen
420 Hósvík

# Gott stevnubingo

verður í bygdarhúsinum í Hósvík
mikudagin 19. juni kl. 19.00

Nógvir góðir vinningar m.a. á lutaseðli:

10 lutir á lutaseðli:
Ferð fyri tvey við bili í tveykoyggjukamari til Bergen við Norrönu
Gávubræv døgurðamatur frá MBM laksur
Fløguspælari til bil o.m.a



Full pláta - gávukort á 400 kr. frá Inn
Tó 6 spæl gávukort á 500 kr. Nógvur døgurðamatur frá MBM og Fototól virði á 1.895 kr. og nógv annað gott

Øll eru vælkomin
Hósvíkar Róðrarfelag
&
Bygdarfelagið Varðin

# SPREINGIPULVUR

Til klúgving av steinum



**Vælegnað til tún, kjallarir o.a., har tað ikki ber til at spreingja**

**Fæst í 2 kg og 10 kg spannum**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla & umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

# Sethúsaklædningur



Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

**pf Klement Petersen**
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



# Býráðsskrivstovan í summarfrítíðini

Nú flestu starvsfólk fara í summarfrí, fer býráðsumsitingin í tíðarskeiðinum:

**15. juli – 16. august 2002**

**bert at avgreiða tey mest neyðugu og átrokandi málini.**

Heitt verður í hesum sambandi á fólk, ið ætla sær undir bygging o.a. í summar, um at útvega sær neyðugar góðkenningar til hetta áðrenn 15. juli.

**Telefon- og upplatingartíðirnar** eru hvønn gerandisdag millum:

**kl. 10.00-12.00 og 14.00-16.00.**

# Summarsteðgur hjá nevndum og býráði

Í juli og august er summarsteðgur í teimum regluligu nevndar- og býráðsfundunum.

**Næsta nevndarumfar** eftir summarsteðgin verður

**í september mánað,**

og **mál, sum ynskjast viðgjørd** á hesum fundum, skulu vera býráðsumsitingini í hendi í seinasta lagi **19. august 2002.**

**Klaksvíkar býráð,**
Nólsoyar Páls gøta 32 · Postsmoga 2
FO-700 Klaksvík
Tlf. 45 63 88 · Fax 45 63 99

# Bilur við frontskaða til sølu

**Merki:** Toyota Corolla Hatchback XLI – 3 hurðar
**Árg.:** 1995
**Km:** 118.000
**Eyka útstýr:** Sóltak

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Att.: Fróði Müller, sýnsmaður
tlf. 34 57 27
fax nr. 34 56 07

At hitta mánadag-hósdag millum kl. 09.00-10.00 og fríggjadag millum kl. 09.00-16.00.

# Nissan Patrol

árg. 86, sýnaður í 2001, til sølu fyri 30.000 kr.

**Tlf. 213046**

# GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra 1,0**
grønur, 3 hurðar,
árg. 2000, 35.000 km.
**88.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 91.000 km.
**105.000**

**Nissan Primera 1,6**
svartur, 4 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
**110.000**

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
**105.000**

**Peugeot 106 Diesel**
gráur, 3 hurðar,
árg. 1996, 110.000 km.
**72.000**

**Chevrolet Monza**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1988, 98.000 km.
**7.000**

**Ford Escort 1,6**
gráur, 3 hurðar,
árg. 1992, 179.000 km.
**18.000**

**Ford Escort 1,6**
ljósabláur, 5 hurðar,
árg. 1995.
**47.000**

**Ford Transit 100 Van 2500TD**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1996, 137.000 km.
**75.000**

**Honda Civic 1,4is**
grønur, 3 hurðar,
árg. 1998, 101.000 km.
**99.000**

**Mitsubishi P.U. 4x4 Dti**
grønur, 2 hurðar,
árg. 1999, 125.000 km.
**125.000**

**Nissan Almera 2,0D**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1998, 119.000 km.
**110.000**

**Nissan King Cab 4x4 Diesel Turbo**
blágráur, 2 hurðar,
árg. 1998, 60.000 km.
**130.000**

**Opel Astra 1,4**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 76.000 km.
**55.000**

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
**67.000**

**Opel Astra 1,6**
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1999, 52.000 km.
**119.000**

**Opel Astra 1,6**
svartur, 5 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
**105.000**

**Opel Astra 1,7Dt**
beige, 5 hurðar,
árg. 1996, 95.000 km.
**78.000**

**Opel Corsa 1,4**
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1996, 105.000 km.
**68.000**

**Opel Corsa 1,2 S**
reyður, 3 hurðar,
árg. 1990, 120.000 km.
**10.000**

**Gevi gætur: Bilarnir á listanum kunnu ver a seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

**P/F Meinhardt Arge**
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Aðalstjóri til Løgmálaráðið

Av tí at løgmaður hevur gjørt av at seta á stovn Løgmálaráð, verður við hesum søkt eftir aðalstjóra.

**Starvið**
Aðalstjórin er ovasti ráðgevi hjá avvarðandi landsstýrismanni og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Løgmálaráðnum. Aðalstjórin fær høvuðsábyrgdina av at skipa Løgmálaráðið og skal standa fyri at skipa arbeiðið viðvíkjandi yvirtøkuni av løgregluni og rættarskipanini.

**Arbeiðsøkið fevnir í høvuðsheitum um:**
- Lógamál
- Dómsmál
- Grundlógararbeiði
- Kommunumál
- Løgreglu og ákæruvald
- Sivilrættarmál
- Skráseting og nøvn
- Útlendingamál

**Almenn førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava útbúgving sum løgfrøðingur ella aðra samsvarandi útbúgving frá lærdum háskúla. Viðkomandi skal hava leiðsluroyndir frá almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum. Umráðandi er, at tann, ið settur verður, hevur evni til at seta í verk fyriskipanir, hevur nútíðar leiðslueginleikar, góð greiningarevni, innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting. Dentur verður lagdur á persónligar eginleikar so sum evni til at eggja og menna leiðarar og starvsfólk, góð samstarvsevni, vilja til at royna nýggj virkisøki og áhuga fyri avbjóðingum.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv og er í løtuni flokkað í 39. lønarflokki umframt eina viðbót uppá kr. 3.984,75 um mánaðin. Starvsheitið er aðalstjóri. Setanarøkið fevnir um Løgmálaráðið, Løgmansskrivstovuna og hini málaráðini. Tænastustaðurin í løtuni er Løgmálaráðið.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til Marjuna Hanusardóttur, løgmansstjóra, tlf. 35 10 10 ella 21 10 23.

**Umsókn**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli, skulu stílast løgmanni, og sendast Løgmansskrivstovuni, att. Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, Tinganes, Postsmoga 64, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 19. juli 2002.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Ólavsøkan 2002

Viðvíkjandi sølu og tiltøkum

Freistin at flyggja inn umsóknarblaðið er sett til hósdagin 20. juni 2002 kl. 12.00.

Umsóknir, sum koma inn aftan á 20. juni 2002 kl. 12.00, verða ikki viðgjørdar.

Øll søla og tiltøk, sum skulu vera á ólavsøku ella lýsast í ólavsøkuskránni í ár, skulu nýta serligt umsóknarblað, ið fæst í Snarskivuni.

www.torshavn.fo

www.sosialurin.fo